GJALDSTOVAN

# Fylgiskjal A

Kravfesting

Viðvíkjandi avsláttarskipan í samband við keyp av vørum á byggimarknaðinum til landsins stovnar

# Innihald

Viðvíkjandi avsláttarskipan í samband við keyp av vørum á byggimarknaðinum til landsins stovnar


a. Yvirskipað ........................................ 3
b. Endamál ........................................ 3
c. Úrval av vørum ........................................ 3
d. Krøv til tal av handlum og bílegging av vørum ........................................ 4
e. Krøv til vørur ........................................ 4

# Avsláttarskipan í samband við keyp av vørum á byggimarknaðinum til landsins stovnar

## a. *Yvirskipað*

Gjaldstovan vil geva tykkum møguleika at bjóða uppá eina avsláttarskipan í samband við keyp av vørum á byggimarknaðinum til landsins stovnar.

Henda kravfestingin lýsir nýtsluøki og karmarnar fyri komandi sáttmálan. Harumframt lýsir kravfestingin krøvini til tær vørur og tænastur, ið sáttmálin fevnir um.

## b. *Endamál*

Endamálið við hesum fylgiskjali er at lýsa vøruúrvalið og yvirskipaðu krøvini, sum eru galdandi fyri vørurnar, ið eru fevndar av hesum sáttmála, og sum veitarin skal lúka innan teir ymsu vørubólkarnar.

## c. *Úrval av vørum*

Vøruúrvalið í hesum sáttmála fevnir um tað til eina og hvørja tíð galdandi vøruúrvalið hjá komandi veitarum innan teir vørubólkar, sum eru lýstir og avmarkaðir í *Fylgiskjali C - Veitarans avsláttur og prísir*. Allar vørurnar, sum komandi veitari hevur í sínum vøruúrvali innan teir lýstu og avmarkaðu vørubólkarnar, eru fevndar av sáttmálanum.

Komandi veitarin kann víðka um vøruúrvalið við at leggja nýggjar vørur afturat teimum greinaðu vørubólkunum, sbrt. ásettu allýsing og avmarking í *Fylgiskjali C - Veitarans avsláttur og prísir*.

## d. *Krøv til tal av handlum og bílegging av vørum*

Fyri at lúka tørvin hjá landsins stovnum, er tað eitt minstakrav, at veitarin hevur minst eitt sølustað í Føroyum.

Veitarin skal geva landsins stovnum møguleikan at bíleggja vørur umvegis ein nethandil, teldupost ella líknandi.

Veitarin skal koyra vørur út til bústaðir hjá stovnum kring alt landið. Veitarin átekur sær eisini ábyrgdina av at koyra út allar vørur óskalaðar til avtalaða stað.

## e. *Krøv til vørur*

Allar vørur skulu til eina og hvørja tíð lúka galdandi lógargreinar. Hetta er eisini galdandi viðvíkjandi lógarheimild og trygd viðvíkjandi vørunum. Veitarin skal tryggja, at seldu vørurnar hava eina góðsku, sum svarar til vanligu góðskuna innan hesa vinnugrein, harundir at tær eru egnaðar til og hava eitt haldføri, sum svarar til tørvin hjá kundunum.